# Skeið í byggiløgfrøði

Vinnunám skipar 4. og 5. mei fyri einum skeiði í byggiløgfrøði

## Hvat fæst burturúr skeiðnum

Á skeiðnum verður undirvíst í løgtingslóg um útbjóðing v.m. og avtalugrundarlagnum millum byggiharrar og arbeiðstakarar, ABF06. Greitt verður frá ásetingunum á "vanligum" máli, og kunnað verður um dómar og avgerðir, ið eru knýtt at útbjóðingarlógini og AB92, ið er grundarlagið undir ABF06.

## Hetta lærir tú

Tú lærir m.a. um:

- útbjóðingartreytir
- avtalugrundarlagið, herundir eisini trygdir og trygging
- útinning av arbeiðinum og gjaldsskylduna hjá byggiharrum
- tíðarfreistleingjan og seinkan
- handan av arbeiðinum og handfaring av manglum

## Hvør luttekur

Skeiðið er m.a. ætlað teimum, sum fyrireika ella luttaka í útbjóðingum av byggiverkætlanum. Hetta kunnu t.d. vera starvsfólk í byggifyritøkum, fyrisiting hjá byggiharrum og ráðgevar. Onnur áhuga kunnu eisini takað lut á skeiðnum.

## Undirvísari

Undirvísari á skeiðum verður Peter Andersen, leiðandi løgfrøðingur hjá Håndværksrådet, ið fleiri ferðir áður hevur hildið skeið í Føroyum.





## Tíð og stað

Skeiðið verður hildið á **Hotel Føroyum týsdagin og mikudagin tann 4. og 5. mai 2010**

**Skeiðið byrjar** báðar dagarnar **kl. 8.30** og tá fæst eisini kaffi og morgunbreyð. Skeiðið endar umleið kl. 16.

## Kostnaður

Kostnaðurin fyri limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag og undirfeløgum tess er kr. 4.900. Kostnaðurin fyri onnur er kr. 6.500,-

Við í prísinum er eisini morgunmatur, miðmáli og kaffi

Tilmelding á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo ella á telefon 309900.

**Tilmeldingarfreistin er mánadagin 19. apríl 2010**

Vinnunám, Smærugøta 9A
Postboks 1038, FO-110 Tórshavn

VINNUNÁM
SKEIÐ OG TILTØK VINNUHÚSINS

Tel +298 30 99 00, Fax +298 30 99 01
vinnunam@industry.fo, www.industry.fo